# Ein skandala

*Oddvør Johansen hevur verið í uppskoti til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Men nú verður hetta helst av ongum, tí týðarin verður ikki liðugur at týða bókina innan ásettu tíð. Formaðurin í Ritøvundafelagnum metir hetta at vera eina skandalu fyri føroyskar høvundar. Bókin verður í uppskoti næsta ár*



*Tað var í desember í fjør, at tað kom fram, at Oddvør Johansen var í uppskoti til virðislønina hjá Norðurlandaráðnum*

DAGFINN OLSEN

– Sum formaður í Rithøvundafelag Føroya má eg siga, at hetta er ein skandala. Eg haldi at týðarin, Erik Skyum Nielsen, hevur sett føroyskar rithøvundar í eina keðiliga støðu, sigur Gunnar Hoydal til tíðindini um, at Oddvør Johansen ikki kemur uppá tal til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, tí týðarin ikki hevur klárað at halda tað hann hevur lovað.

Gunnar Hoydal veit ikki, um hetta fær nakrar avleiðingar, men málið verður tikið upp á fundi í Rithøvundafelagnum.

Í føroysku nevndini, ið innstillar til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, sita Turið Sigurðardóttir, Jógvan Isaksen og Ebba Hentze.

Á einari vánaligari telefonlinju fingu vit tó stutta viðmerking frá Jógvani Isaksen í Keypmannahavn, ið segði, at tey í nevndini langt síðani høvdu fyrireikað seg og enntá høvdu ferðaseðlar og rúm á gistingarhúsi til reiðar. Men Jógvan kundi bert staðfesta, at týðarin hevði ikki megnað sína uppgávu.

Ebba Hentze staðfestir, at týðarin hevur átikið sær eina uppgávu, hann ikki megnaði, og at hann ikki boðaði frá hesum í góðari tíð. Hon hevur tó í faxi fingið at vita, at bókin hjá Oddvør ístaðin verður í uppskoti til virðislønina komandi ár.



*Eg haldi at týðarin, Erik Skyum Nielsen, hevur sett føroyskar rithøvundar í eina keðiliga støðu, sigur Gunnar Hoydal, formaður í Rithøvundafelag Føroya*

**Týdd**

Tað var í desember í fjør, at tað kom fram, at Oddvør Johansen var í uppskoti til virðislønina hjá Norðurlandaráðnum fyri bókina »Í morgin er aftur ein dagur«.

Men hetta verður nú av ongum, tí týðarin ikki hevur megnað at gera týðingina, áðrenn tíðarfreistina.

Oddvør gav fyrstu bók sína út fyri 17 árum síðani. Tað var bókin »Lívsins summar«, ið er týdd til svenskt og danskt. Oddvør hevur fingið M.A. Jacobsens virðisløn og Barnabókavirðisløn Tórshavnar Býráðs.

Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins er 350.000 krónur, umframt stóra heiðurin. Um eina góða viku verður gjørt av, hvør fær virðislønina, ið verður latin 6. mars.

Oddvør hevur verið í uppskoti millum tólv høvundar úr hinum Norðurlondum.

Hini ellivu, sum eru í uppskoti til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina næsta ár, eru úr øllum Norðurlondum.Yrkjarin Henrik Nordbrandt fyri yrkingasavnið »Drømmebroer«, sum kom út í fjør, og høvundurin Thomas Boberg fyri essaysavnið »Americas. Rejseminder«, sum er komið í ár. Báðir eru úr Danmark. Úr Finlandi eru høvundurin Paavo Rintala og yrkjarin Peter Sandelin í uppskoti fyri ávikavist skaldsøguna »Faustus« og yrkingasavnið »Tysnader, ljus«. Skaldsøgan er frá 1996 og yrkingasavnið frá í fjør. Íslendingurin Guðbergur Bergsson er í uppskoti fyri skaldsøgurnar »Faðir og móðir og dulmagn bernskunnar« og »Eins og steinn sem hafið fágar«. Kristín Ómarsdóttir, somuleiðis úr Íslandi, er í uppskoti fyri skaldsøguna »Elskan mín ég dey«, sum kom út í 1997.Tveir norðmenn eru í uppskoti. Teir eru Frode Grytten og Georg Johannesen fyri ávikavist skaldsøguna »Bikubesong«, sum er komin í ár og yrkingasavnið »Ars vivendi«, sum somuleiðis er komið í ár. Úr Svøríki eru eisini tvey í uppskoti, Katarina Frostenson fyri yrkingasavnið »Korallen« og Beate Grimsrud fyr skaldsøguna »Jag smyger forbi en yxa«. Báðar bøkurnar eru komnar í ár. Grønlendingurin Jørgen Fleischer er í uppskoti fyri »Seeredaaq og de andre«, sum er eitt frábrigdi av upprunaútgávuni »Seeredaaq allalu«.



*Ronnie Nielsen tók upp og legði til rættis fløguna hjá Ragnar Jacobsen, Ragnar í Vík*

# Ragnar á top 30

*Ragnar Jacobsen, Ragnar í Vík, er við countryfløguni »The silence of a falling star« komin á The European Independet Labels Country Top 30*

Føroyskan tónleik til útflutnings. Hetta hava vit hoyrt við jøvnum millumbilum seinastu árini. Og ofta hevur verið vónað og bíðað eftir føroyska gjøgnumbrotinum. Tað gongur støðugt rætta vegin, kann staðfestast.

Fyri fyrstu ferð er tað eydnast einum føroyskum sangara at koma á ein almennan útlendskan hittlista. Talan er um Ragnar Jacobsen, Ragnar í Vík, sum við countryfløguni »The silence of a falling star« er komin á The European Independet Labels Country Top 30.

European Media Services (EMS) setir listan saman.

Í januar er Ragnar komin við á eina fløgu, sum nevnist Country Hotdisc. Hetta er sølufremjandi tiltak, sum bretin Stuart Cameron stendur fyri. Fløgan fer eftir ávísari skipan til øll útvarpsfólk, sum spæla country og hon verður dagførd hvønn mánað.

Í januarfløguni syngur Ragnar »Alone and Forsaken«, í februar »Did you miss me« og í mars verður uppaftur ein sangur hjá Ragnar við á Country Hotdisc fløgunum.

# Kim Larsen við í nýggjum filmi



DAGFINN OLSEN

Kim Larsen er í Føroyum, eins og í Danmark, fólkaogn. Hann er ikki óroyndur í filmheiminum. Í áttatiárunum skrivaði og leikaði hann í filminum »Midt om natten«.

Nú skal hann aftur royna seg. Klaus Riffbjerg hevur lokkað Kim Larsen at leika við í einum nýggjum filmi, ið eisini hevur tónleik við.

Talan er um film hjá ungum og óroyndum leikstjóra, ið ger sín fyrsta film. Tað er Dariuz Z. Steiness, ið ætlar at gera film, ið nevnist »Charlie Butterfly«.

Filmurin skal takast upp í Polen.



# Byggir snikkaravirkið í Dali

*Bødvar Poulsen, sum í løtuni rekur Snikkarakjallaran í Norðasta Horni, flytir, um ein mánað ella so, til Dals og ikki nóg mikið við tí har hann fer at reka snikkaravirkið víðari. Í løtuni er hann í holt við at byggja virkisbygningin, sum eftir ætlan skal takast í nýtslu um mánaðarskiftið februar marts*



*Um ein mánað ella so flytir Bødvar Poulsen, snikkari, við familju til Dals, har hann letur upp nýtt snikkaravirki*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

SVEINUR TRÓNDARSON

Um ein mánað ella so kemur fyrsta veruliga arbeiðsplássið í Dali, tí tá letur havnarmaðurin Bødvar Poulsen, upp nýggjan snikkaraverkstað í bygdini.

Tað er so at siga tann øvugta verð, at ein havnarmaður soleiðis flytir út á bygd, tí tað mest vanliga er, at í meira lagið flytir til Havnar.

Men hjá teimum, sum tosað um bygdamenning, er tað kortini stuttligt at hoyra, og ikki verður tað verri tá snikkarin sjálvur sigur orsøkina verða:

– Tað kann fyri so vítt verða líkamikið um eg geri trappurnar í kjallaranum í Havn, ella um eg geri tær í Dali.

**Øll familjan flytir**

Tað er Bødvar Poulsen, snikkari, vit tosa um, og saman við konu og tveimum smábørnum selir hann húsini í Havn, keypir samstarvsfelagan út og flytir til Dals at búgva.

Hann sigur:

– Børnunum dámar so einastandandi væl í Dali, og sama er við okkum báðum, og tí hava vit valt at stinga í sekkin og flyta suður um Skopunarfjørð.

Bødvar rekur sjálvur annar Snikkarakjallaran, sum heldur til í sethúsum hansara í Norðasta Horni. Har hava teir hildið til í eini trý ár, og hesa tíðina hevur hann fingið nógvar góðar kundar.

Teir takast næstan bara við at gera trappur, og av somu orsøk heldur hann onga forðing vera yvirhøvur fyri at flyta virksemi til Dals.

– Í grundini kann tað gera tað sama hvar tú ert, tá tú gert trappur. Flutningurin skal sjálvsagt leggjast afturat, men tí tekur Strandferðslan sær av, sigur hann og leggur afturat, at frástøðan til Havnar har størsti marknaðurin er, er ikki so stór.

Bátur siglur fleiri ferðir um dagin, og skal hann til Havnar at taka mát, so kann hann vera í Havn klokkan hálvgun átta, so tað er eingin forðing sum so

**Betri útgangasstøði**

Nú Bødvar flytir virksemi til Dals, er hann sum sagt farin undir at byggja nýggjan virkisbygning.

Grundøkið er liðugt planerað, og í hesi vikuni fer hann suðuraftur at seta formarnar upp.

– Eg skal gera alt arbeiði sjálvur so at siga, og tí verður kostnaðurin ikki tann øgiligi tá virkið er liðugt. Onkustaðni millum 400 og 500 túsund krónur, sigur Bødvar.

Og tað er ikki illa sloppið tá hugsað verður um, at virkisbygningurin 160 fermetrar til støddar.

Tískil eru fíggjarligu umstøðurnar at reka virkið í Dali, nakað væl betri enn tær eru, eitt nú í høvuðsstaðnum, har tað er dýrt at keypa sær grundøki.

**Heimurin tódnar**

Hóast tað fyri mong kann tykjast djarvt at flyta út á bygd, so óttast Bødvar ikki á nakran hátt fyri nøkrum í tí sambandi.

– Vit kenna okkum ótrúliga væl í Dali, tá vit hugsa um, at tøknin er sera framkomin, so er so lætt at samstarva við umheimin, sigur Bødvar.

Hann vísir á, at tað er so lætt at samskifta við onnur, til dømis um internetið, so tað fer ikki at bila.

Tá snikkaravirkið í Dali fer undir virksemi um mánaðarskiftið februar marts, byrjar hann ikki á berum - minni enn so.

– Eg havi ein rættiliga stóran ordra liggjandi, sum eg skal undir um tað mundi, og eg ætli mær at gera alt suðuri í Dali. Eydnast tað ikki, so byrji eg í Havn og flyti tá tað er klárt í Dali, sigur Bødvar.

# – Lívgar um virksemi í bygdini

*Eyðvør Dam, bygdaráðformaður, er í sjeynda himli yvir, at eitt virkið flytir til kommununa. – Hetta er fyrsta virkið í kommununi og tað er stuttligt at fólk flyta til Dals úr høvuðsstaðarøkinum, sigur hon*

SVEINUR TRÓNDARSON

Kommunan er ikki tann størsta í landinum - 160 fólk íalt, og í báðum skúlunum tilsamans ganga færri enn tíggju børn.

Synd er at siga, at tað hevur verið stórvegis virksemi í kommununi til nú, og tí er ikki so løgið at skilja, at bygdaráðssformaðurin í Dali frøðist yvir, at lív kemur í.

– Tað er ótrúliga hugaligt at síggja, at virkið fólk flytir til bygdar. Tað hevur ikki verið nakað virkið í kommununi áður, og tí er tað serliga stuttligt at síggja.

Eyðvør frøðist, sum vera mann, um, at hetta er tað beint øvugta av tí sum vit siga er vanliga gongdin í landinum.



– Vit merkja tað serliga væl her suðuri, tí tá tey ungu eru liðug við barna- og framhaldsskúlan, flyta tey av oynni, og tað eru tey fægstu, sum koma aftur til bygdina. Tí er hetta serliga hugaligt, sigur Eyðvør Dam.

Fyri stuttum avgjørdu politikkarar at gera okkurt serligt fyri at stimbra fólki at flyta aftur í útjaðaran, men síðani er ikki so nógv hent á tí økinum.

Hetta er nakað, sum ber á tað borðið, men Eyðvør heldur, at júst henda flytingin vísir, at tað kann gera tað sama, hvat politikarar gera og siga, tí flytir fólk ikki til útjaðaran av egnum ávum, so er líkamikið hvat politikarar siga og gera.

## Rætting til grein um Strandferðsluna

SVEINUR TRÓNDARSON

Í greinini um Strandfaraskip Landsins í blaðnum í gjár, varð sagt, at tann eini maðurin á myndini var Helgi Nielsen, roknskaparleiðari.

Hetta er skeivt, tí talan var um Hera Joensen, sum hevur ferðafólkaflutningin um hendi.

Eg fari at biðja teir báðar bera yvir við mistakinum.